




# Húð og hendur

**1:** Ger hendurnar vátar og gníggja tær við bodyscrub ella grovum salti, soleiðis at deyða húðin hvørvur.

**2:** Smyr eitt røktandi og feitt krem á. Nýtir tú ofta neglalakk, treingja neglirnar eisini til feitt. Gníggja tí eisini krem á neglirnar, so tær ikki gerast turrar og flusna.

***PREI:** Vit viðmæla kremini frá Clarins ella Elizabeth Arden.*

**HÚÐ** OG **HENDUR** ERU MANGAN IKKI HEILT **SUMMARKLÁR**, TÁ FYRSTU GÓÐU DAGARNIR KOMA. **MEN** TAÐ ER BÆÐI **SKJÓTT** OG **LÆTT** AT **FRÍSKA HENDURNAR** UPP OG GEVA **HÚÐINI** NÓG MIKIÐ AV **VÆTU**, SO HON KANN **VÍSAST** FRAM Í LØTTUM **SUMMARKLÆÐUM**









**4:** Nýt síðani ein rósupinn og skumpa varliga neglabondini av neglini aftur inn móti neglarótini.

**3:** Gev neglabondunum bleytgerandi olju

***PREI:** Make Up store er júst komin við eini góðari, nýggjari neglabandsolju, ið hevur pensil at smyrja við. Tann heimagjørda útgávan er at bloyta neglabondini í eini skál við lunkaðum vatni og mat- ella mandluolju.*

***PREI:**Ført tú neglalakk á húðina hevur makeupstore júst gjørt ein nýggjan rættingarpen við neglalakksfjernara, ið er sera góður at rætta við*




**5:** Fíla neglirnar inn móti miðjuni og ikki ov langt niður á síðunum.




**6:** Smyr eitt vakurt neglalakk á. Litirnir í summar eru nýggir og forvitnisligir. Hesir eru frá Chanel






***BODY BUTTER DUO***

*The body shop hevur leingi verið kent fyri teirra sonevnda "bodybutter", ið er eitt mást til teirra, ið hava turra húð. Men nú hevur Bodyshop gjørt eina kombi-vøru: eina dós, ið bæði hevur krem til turra og vanliga húð, eftirsum øll húðin jú ikki hevur sama tørv á vætu. Tummil upp fyri hesi vøruni, sum eisini stuðlar 3. heiminum!*